## DAGSINS MEINING

### Fólkaatkvøða – ella val?

Í morgin er 1. februar, og tá skulu føroyingar hava at vita, hvussu spurningarnir skulu vera á fólkaatkvøðuni flaggdagin. Men - og tað er eitt stór men - mánakvøldið vóru landsstýrisflokkarnir alt annað enn samdir um tilgongdina.

Flokkarnir eru ikki samdir um lógaruppskotini um, hvussu málsøkini skulu yvirtakast, hvussu blokkurin skal »niðurlagast«, hvussu langt áramálið skal verða, og heldur ikki eru flokkarnir samdir um fólkaatkvøðudagin.

Tað merkir, at flokkarnir eru grundleggjandi ósamdir um øll viðurskifti í samband við fólkaatkvøðuna. Tað veri seg lógaruppskot og meiri praktisk viðurskifti. Tí er spurningurin, um vit kunnu rokna við løgtingsvali í næstum?

Nú er ikki nógv, sum lekur út, men tað skilst, at Tjóðveldisflokkurin heldur fram at »spæla við vøddunum«, sum onkur annar í samgonguni hevur sagt.

Bæði Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin síggja vandan í hesi leið og bera ótta fyri, at samgongan »missir alt á gólvið«. Harafturat halda hesir flokkar, at nýggja ætlanin er í stríð við stýrisskipan og tingskipan okkara.

Uttan at siga tað í orðum, verður við uppskoti til samtyktar lagt upp til, at Føroyar gerast fullveldisríki. Men samstundis skulu vit varðveita blokkin í eini »niðurlaðingartíð«. Hvat sigur danska stjórnin til tað? Neyvan fer hon at góðtaka at lata stuðul til Føroyar, sum hava lýst seg at vera fullveldisríki!

Spurningurin er so, um teir »hóvligu« flokkarnir klára einaferð afturat at fáa Tjóðveldisflokkin at bakka. Sjálvstýrisflokkurin og Fólkaflokkurin kunnu ganga vítt, men teir góðtaka ikki, at blokkurin skal laðast niður eftir 10 árum, og harafturat halda teir, at skopbráið til 25. apríl er ov stutt.

Í løtuni fer politiska toganin fram í loyndum, og tí eru nógv gitingar, men nógv av tí, sum er komið fram, tykist óbúgvið! Tað er hóast alt framtíðin hjá Føroya fólki, sum málið snýr seg um. Og meiri loyniligt og ivingarsamt alt er, størri møguleiki er fyri einum braki á fólkaatkvøðuni, um hon í heila tikið verður!

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Voldborg sigur farvæl



Hann er veðurmaðurin yvir øllum veðurmonnum. Fryntligi og hugnaligi Henrik Voldborg, sum í Danmarks Radio hevur sagt frá veðrinum líka síðani 1963. Men í gjárkvøldið trein Voldborg fram á skíggjan fyri seinastu ferð. 64 ára gamli veðurmaðurin fer nú frá við eftirløn.

Við sínum bera skalla og litríku og sera eyðkendu bundnatroyggjum hevur Voldborg verið fastur fúsur í næstan hvørjari danskari stovu hesi seinastu mongu árini. Hann byrjaði at spáa um veðrið eina ferð um vikuna í TV-avísini í 1963, og hann gjørdist av álvara ein kendur persónur í 1988, tá ið veðurtíðindini komu á skránna sjey ferðir um vikuna.

Tað var meira ein sportur at siga frá veðrinum í gomlum døgum, tá tøknin ikki var so framkomin sum nú, heldur Voldborg.

- Tá vistu vit ikki, hvussu veðrið fór at verða nakrar dagar fram, og tí máttu vit brúka okkara royndir og góðu nøs. Í dag eru fimmdagaforsagnirnar líka góðar sum forsøgnin fyri ein dag var fyri 20 árum síðani, greiðir Voldborg frá í Jyllands-postinum.

Tað eru uttan iva nógvir føroyingar, sum kenna Voldborg frá skíggjanum, og aðrir kenna hann eisini frá veruliga lívinum. Voldborg var millum teirra, sum lærdi frá sær, tá ið veðurmaðurin hjá Sosialinum, Petur Skeel Jacobsen, sat á skúlabeinki í Kastrup-floghavnini fyrst í sekstiárunum, og teir báðir arbeiddu saman hjá Danmarks Meteorologiske Institut í næstan 30 ár – frá 1962 til 1991.

Petur Skeel hevur alt gott at bera Henrik Voldborg, sum hann lýsir sum ein sera fryntligan persón. Har Voldborg er, skal okkurt henda, og hann byrjaði skjótt at keða seg, um eingi útlit vóru fyri broytingum í veðrinum, ella hann hevði frívakt. Men at hann er dugnaligur, prógva mongu árini á sjónvarpsskíggjanum um, og hetta skoðsmálið fær hann eisini frá starvsfeløgum á Danmarks Radio.

Petur Skeel lýsir eisini Voldborg sum eitt ”selskapsmenniskja”, og nú hann hevur sagt frá veðrinum fyri seinastu ferð, fer Voldborg at gera meira við klaverspælið, tónleikin og tennisspælið, og so ætlar hann at ferðast meira enn hann hevur fingið stundir til higartil.

Hóast hann fer at sakna tilveruna sum sjónvarpssveðurmaður, so gleðir hann seg til pensjónistatilveruna.

- Eg gleði meg at koma burtur frá dagliga rokinum í TV-býnum. Vaktirnar eru upp í 12 tímar til longdar hvønn dag, og tú ert beinleiðis á skíggjanum fýra ferðir um dagin. Tað er eitt sindur hart, sigur kendi danski veðurmaðurin.


*Bergur Hanusson, djóralækni*


*Heri Joensen, prestur*


*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*


*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*


*Jens Andreassen, lækni*


*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*


*Jón Klein Olsen, politistur*


*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*

## Spyrjið serfrøðingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,

Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merkið, hvørjum tit seta spurningum.

**Svarini verða prentað í blaðnum mikudag**


*Julianna Næs, pedagogur*


*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*


*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*


*Marius Staksberg, málfrøðingur*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Norðoya Bjargingarfelag fær dyggan stuðul

**Norðoya Sparikassi hevur gjørt trý ára sponsoravtalu við Norðoya Bjargingarfelag, og hendan avtala er munandi fíggjarligur styrkur hjá bjargingarfelagnum**

BJARGING
*Eyðun Klakstein*


*Nevndin í Norðoya Bjargingarfelag saman við stjóranum í Norðoya Sparikassa*

Norðoya Bjargingarfelag fær næstu trý árini árligan stuðul frá Norðoya Sparikassa, og økta fíggjarliga orkan hjá bjargingarfelagnum skal nýtast til at keypa útgerð og útbúgva fólk.

– Avtalan, sum vita hava gjørt við sparikassanm er ein munandi fíggjarligur styrkur hjá felagnum, og tað eru vit sera fegnir um, sigur Marius Magnussen, sum er formaður í nevndini fyri Norðoyða Bjargingarfelag.

Mánakvøldið hitti nevndin stjóran í Norðoya Sparikassa, Eyðfinn Reyðberg, og tosað varð um nýggju avtaluna, sum er gjørd millum feløgini.

– Tað er áhugavert, at Norðoya Bjargingarfelag rættiliga ætlar at taka táttin upp aftur, og vit eru sinnaðir at stuðla hesum arbeiði komandi árini, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa.

### Elsta felagið

Norðoya Bjargingarfelag, sum eisini hevur navnið Bjargingarfelag Føroya, er elsta felag av sínum slagi í landinum.

Tað var stovnað í 1957, og í fyrstu nevndini sótu P. Waagstein, Vilhelm Vilhelmsen, Hans Andrias Johannesen, Joen Olsen og Alfred Petersen.

Felagið ferðast í fimti og seksti árunum kring landið og var eisini við til at stovna onnur bjargingarfeløg kring landið. Harafturat syrgdi Norðoya Bjargingarfelag fyri innsavning av pengum, so útgerð kundi keypast bæði til felagið í Norðoyggjum og hini feløgini í landinum.

Norðoya Bjargingarfelag hevur nú gjørt ein ætlan fyri, hvussu felagið skal skipa seg, og hvussu fólk í Norðoyggjum kunnu fáa grundleggjandi útbúgving, sum kann koma teimum til góðar í bjargingararbeiði.

Harafturat hevur felagið eisini fingið nýggj høli á Stongunum í Klaksvík, har ætlanin er at goyma útgerð og hava virksemi av ymsum slagi.

### Skipa fyri skeiðum

Norðoya Bjargingarfelag hevur sett gongd á arbeiðið at manna bólkar í felagnum, sum kunnu fara út, tá okkurt er áfatt. Fyrsti av hesum bólkunum er farin undir skeiðvirksemi, sum bjargingarfelagið skipar fyri.

Í bólkunum verða fólk við ymiskum útbúgvingum og royndum, og ætlanin er, at tey skulu fáa grundleggjandi vitan innan fleiri øki, sum hava við bjarging og hjálpararbeiði at gera.

– Pengarnir, sum vit fáa burtur úr sponsoravtaluni við Norðoya Sparikassa, verða brúktir til at skipa fyri ymsum skeiðum og til at keypa neyðuga útgerð, sum felagið hevur brúk fyri, sigur Marius Magnussen, formaður í felagnum.

Stjórin í Norðoya Sparikassa sigur, at tað hevur týdning fyri teir, at slíkt felag er í Norðoyggjum.

– Hetta er eitt felag við nógvum árum á baki, sum áður hevur víst sínar dygdir, og tí haldi eg, at hetta tiltakið við at skipa bólkar og útbúgvar fólk er sera gott og kann koma fólki í Norðoyggjum til góðar, sigur Eyðfinn Reyðberg.

– Sparikassin stuðlar alment vælgerandi endamálum, og hesir pengarnir fara avgjørt til eitt gott endamál.





*Formaðurin í nevndini fyri Norðoya Bjargingarfelag, Marius Magnussen, og stjórin í Norðoya Sparikassa, Eyðfinn Reyðberg*

## Hittust aftaná 45 ár



Næmingarnir, sum fóru í 1. millumklassa í Klaksvíkar skúla í 1955, hittust aftur í Klaksvík í august mánaði í fjør. Tey hildu 45 ára dagin við at vitja í skúlanum, hjá borgarstjóranum og við veitslu.

Millum næmingarnar vóru Finnbogi Ísakson, Jógvan við Keldu, Karin Kjølbro, Julius Johannesen, Jógvan Ósa, Brynhild Danielsen og Regin Nónstein.

Tríggir av lærarunum vóru eisini við – teir vóru Alex Sólstein, Ove Frederiksen og Daniella Olsen.

Eiler Rasmussen tók hesa myndina í august mánaði í fjør.